Starvslýsing

Heimatænastan

## Røktarstarvsfólk til Røktarheimið á Mørkini

Søkt verður eftir einum røktarstarvsfólki 24 tímar um vikuna í skiftandi vaktum frá 1. januar 2010 ella skjótast tilber.

Starvið verður lønt eftir sáttmála millum Fíggjarmálaráðið og avvarðandi fakfelag. Setanarøkið er Nærverkið og deildir undir tí.

Nærri fæst at vita um starvið við at venda sær til Kristbjørg Toftegaard leiðara á tlf 471050.

**Umsókn**
Umsóknir skulu sendast til:
Røktarheimið á Mørkini
Neystavegur
435 Streymnes
Stílað: Kristbjørg Toftegaard

**Umsóknarfreist: 24. november 2009**

Lesið alla lýsingina á heimasíðu okkara
www.naerverk.fo / leys størv

Røktarheimið á Mørkini er ein samskipaður partur av Heimatænastuni Vágar/Norðstreymoy. Aðalsetningurin fyri heimið er at skapa eitt heimligt og livandi umhvørvi, har trivnaður og sjálvsavgerðarrættur hins einstaka er í hásætið.

NÆRVERKIÐ

Meginskrivstovan · Argjavegur 26 · Postsmoga 3037 · 110 Tórshavn
Tel 360000 · Faks 360001 · naerverk@naerverk.fo · www.naerverk.fo

www.naerverk.fo

Starvslýsing

Trivnaðartænastan

## Avloysari fyri námsfrøðing

**Søkt verður eftir avloysara fyri námsfrøðing í barnsburðarfarloyvi**

Vilt tú vita meira um starvið, ert tú vælkomin at venda tær til Emmu Warberg, leiðara á tlf. 318057, fartlf. 763160.

**Umsókn**
Umsókn saman við prógvi og møguligum viðmælum verður at senda til:

Bústovnurin
Garðsgøta 20
160 Argir
Stílað: Emma Warberg, leiðari

**Umsóknarfreist: 30. november 2009.**

Lesið alla lýsingina á heimasíðu okkara
www.naerverk.fo / leys størv

Trivnaðartænastan rekur og hevur eftirlit við stovnum, sum hava tilboð til persónar, ið hava serligan tørv. Tilboðini hjá Trivnaðartænastuni umfata í løtuni sambýli, bústovnar, dagstovnar, umlættingarstovnar og verkstaðir til fólk við menningartarni og fólk við autismu. Endamálið hjá Trivnaðartænastuni er at kunna veita borgarum, sum hava serligan tørv, bústaðar- virknis- og umlættingartilboð, sum eru lagað eftir ítøkiliga tørvinum hjá einstaka borgaranum.

NÆRVERKIÐ

Meginskrivstovan · Argjavegur 26 · Postsmoga 3037 · 110 Tórshavn
Tel 360000 · Faks 360001 · naerverk@naerverk.fo · www.naerverk.fo

www.naerverk.fo

**DAGSTOVNIN Á ARGJUM**
TRAÐAGØTA 55 · 160 ARGIR

# LEIÐARI
## til Dagstovnin á Argjum

Søkt verður eftir leiðara, sum hevur dirvið og áræðið til at taka ábyrgdina av, at stovnurin verður eitt stað har børn fáa góðar fyrimyndir og mennast saman við starvsfólkunum og læra ábyrgd í felagsskapinum.

Starvið fevnir um ábyrgd av námsfrøðini, trivnað hjá starvsfólkum og umsiting av fíggjarstøðuni hjá stovninum.

Starvið verður sett 1. januar 2010, ella eftir avtalu.

Dagstovnurin er sjálvsognarstovnur við 5 manna nevnd, men verður eftir ætlan kommunalur stovnur frá 1. januar 2011 at rokna.

**Stovnurin leggur dent á**
- Opinleika
- Fakliga menning
- Samstarv
- Øll fáa ábyrgd
- Virðing og trivnað
- Námsfrøði, har dentur verður lagdur á menning og avbjóðing
- Spælið úti og inni
- Vøggustovu, barnagarð og forskúla

**Hví trívast starvsfólki á stovninum**
- Tí eg saman við mínum starvsfeløgum eri við til at seta dám á stovnin
- Tí á stovninum veðrur arbeitt við trivna, dygd og menning
- Tí at opinleiki og góður stemningur er millum arbeiðsfólkir.

**Hvat kunna vit bjóða tær**
- Eitt starv, har tú hevur ávirkan
- Álit og sjálvstøðugt arbeiði
- Eitt starv, har tú nýtir dygdir og samstundis mennir teg sjálvan

**Førleikakrøv**
- Námsfrøðiliga útbúgving
- At tú hevur leiðsluroyndir, dirvið og visiónir
- Faklig vitan, sum kann nýtast í dagliga arbeiðinum
- Góð samstarvsevnir, og duga at skipa arbeiðsuppgávurnar á tann hátt at starvsfólki mennist í arbeiðinum,so øll blíva dugnalig
- Framfýsni og skal fylgja við hvat rørir seg í nútíðini
- Er fús/ur til at taka avbjóðingar
- At ymiskleiki verður virdur
- Hevur teldukunnleika á brúkarastøði

**Setarnartreytur**
Løn eftir sáttmála millum Føroya Pedagogfelag og Kommunala Arbeiðsgevarafelagið

Nærri fast at vita um starvið við at venda sær til Gudrun Winthereig Rasmussen, leiðarin á telefon 219019, ella Jóhan Simonsen, formann í nevndini telefon 286698

Umsóknir við viðmælum, royndum og upplýsingum um útbúgving skal vera á Dagstovninum á Argjum Traðagøta 55, 160 Argir í seinasta lagi mánadagin 14. desember 2009.

# TIL SØLU
Nýggjur køkur til sølu.
Ring 214281

# PEDAGOGUR
## til Ungdómsdeildina á Føroya Barnaheimi

**Søkt verður eftir pedagogi at byrja 1. januar 2010 ella skjótast tilber.**

Tann sum settur verður, skal starvast í skiftandi vaktum á Ungdómsdeildini, har tilsamans 8 fólk eru í starvi.

Endamálið við arbeiðinum á Ungdómsdeildini er fyrst og fremst at at geva børnunum/teimum ungu umsorgan og tryggleika, samstundis sum dentur verður lagdur á at vísa á týdningin av gevandi og mennandi samveru. Hetta verður gjørt við einum skipaðum og viðkomandi gerandisdegi við áhuga og nærleika, við serligum átøkum, og ikki minst við regluligum samrøðum og øðrum uppbyggjandi samskifti. Tað er greitt mál hjá Ungdómsdeildini at hava gott samstarv við foreldur og játtandi myndugleikar, umframt aðrar viðkomandi starvsbólkar og stovnar.

Lønin er sambært sáttmála millum Føroya Pedagogfelag og Fíggjarmálaráðið.

Umsóknir við avriti av prógvum, viðmælum v.m. skulu vera okkum í hendi í seinasta lagi 30. november 2009.

Nærri fæst at vita um starvið við at venda sær til Duritu Petersen, virkandi leiðara á tlf. 312320 ella 225672.

**Føroya Barnaheim**
Pedda við Steingøta 10
FO-100 Tórshavn

Eysturkommuna

# Skattalistin 2008

Skattalistin 2008 fyri Leirvíkar – og Gøtu kommunu liggur frammi á býráðsskrivstovuni við Gøtugjógv frá mánadegnum 23. november fram til 7. desember 2009

**Skrivstovan er opin:**

| | |
|---|---|
| Mánadag – Hósdag | kl. 09.00 – 14.00 |
| Fríggjadag | kl. 09.00 – 12.00 |

Sosialurin
Veðrið
Bilar
Lýsingar
Tíðindi
Viðmerkingar
Ítróttur
Nøvn
Skráir
Tiltøk